

*Framhald av síðu 5*

hetta fyri mær. Far tú bara inn í Koksið og fá tær ein annan køtt. Har eru fleiri hundrað! Nei, ikki vildi eg tað.

Karis, báturin hjá Símuni á Hellunum, sigldi norðum í kvøldarmyrkrinum. Kettan sat frammi í skut og lurtaði eftir alduskvatlinum og visti lítið og einki um hesa løgnu ferð, sum hon óviljað var farin undir. Hon var rænd. Ofta hevði hon fingið at vita frá mammu síni, at menniskjað var ónt. Hetta mátti hon ásanna.

Menninir á bátinum sótu í sissheimi, meðan teir sigldu norður um. Onkur sat og hálvsvav, eitt sindur túraður av útróðri. Klárt var í veðrinum og skyggjísurin glitraði í homrunum í hvøldarmyrkinum. Knappliga fer kettan at ressast í skutinum. Mjavar - ikki sum køttar flest, men mjavini eru eym og í eini fastari rytmu. Tá letur í einum av monnunum í bátinum: "Hetta minnir meg nógv um sjongin frá Sputnikki." Við eitt leyp køtturin upp á ein bekk og fór at mæla um seg sjálvan. Hann reisti seg á bakbeinini og klóraði ímóti himmalhválvinum í ein landsynning. Menninir á bátinum hugdu upp og sóu eitt skyggjandi tinnuljós fara eftir himmalhválvinum. "Hatta má vera Sputnikk!" Og kötturin á bekkinum segði: "Ja" (mjav) á kettumáli.

Tøgnin ráddi í bátinum, meðan jarnhylkið hjá russum fór um hválvið høgt uppi. Kettan var farin fram í rong og sat upp við ennispónin og helt um stavnin, eins og ein stavnamaður, skimaðist og læt við halanum. Kallurin á Kalsoynni bleiv næstan livandi. Hann reistist úr tí bláa havdýpinum og lyfti seg upp til skýggja í aldargomlum sjóði av aldudragi og dropavatni, ið seyraði um syllar og røkur. Útróðrarmenninir hildu hetta vera ódámligt. Teimum líktist einki atburðin hjá hesari kettu og grímuta hamin, ið Kallurin hevði hetta kvøldið. Onkur meinti, at teir skuldu beint fyri kettuni, tí hon hevði mannavit og boðaði frá ófrættum.

Tað var óunniligt at fara norðurum við einum køtti í bátinum sum fylgisneyta og einum fylgissveini í erva. - Vit liva í síðstu tíð. Tekin skulu vera í sól og mána, segði onkur á bátinum. - Hvat annað er hetta uttan tekin? Hetta boðar ikki frá nøkrum góðum.

Komnir um Nestanga, sóust tey fáligu ljósini frá Oyndarfirði pulka sær á firðinum. Hvíti skjøldurin á kirkjuni var í spegilsmyndini innast við. Lygnirnar í aldudragnum togaðu í ljósið og skjøldurin, og fingu tey at krúpa fram við fjøru og fjørukant sum penslastrok í einum málningi. Nærri komið var Hellunum, lá glámlýsið og kíndi váta grótinum undir Rókum og Rustini, men menninir á Karis vóru so meinkunnigir um hesar leiðir, so hetta bilaði ikki. Kettan hevði lagt seg í føvningin á einum av monnunum og lá nú og spann. Hon hevði tað fjálgt og var nøgd við ta nýggju tilveruna. Hon var farin í útlegd.

Adventin á Hellunum var bæði friðarlig og hátíðarlig. Ketturnar og frensarnir vóru í jólahýri. Gingu og erpaðu sær fyri tí nýggja køttinum og hildu hann vera eitt sindur undarligan, tá ið hann hvørt kvøld stillaði seg niðan í bøin, mól í klingur, reisti seg á bakbeinini og hugdi í ein landsynning. So við og við fóru allar kettur og allir køttar á Hellunum at gera tað sama. Ikki vistu teir, hví teir gjørdu hetta, men teir hildu hetta vera stuttligt og eitt nýtt spæl. Í ovfarakæti slerdu hellukøttarnir ring um tann nýggja felagan, sum var komin til bygdina, og kvóðu eitt frensakvæði um kappar og brøgd hjá einum frensi, ið var ættaður úr Sebir. Fólk bitu merki í, at køttaatferðin var vorðin ein onnur upp undir jól á Hellunum 1957. Tey vaksnu hildu hetta vera ódámligt og boðaði ikki frá nøkrum góðum; men børnunum hóvaði væl kettulívið og tóku til sín kettukeipurnar sum eina góða uppliving, nú jólini nærkaðust gørðunum.

Kettan hevði tað gott. Hon var komin millum frændur. Símun á Hellunum var Sonur Jákup Deciderius, sum var abbabeiggi kettuhúsbóndan í Fuglafirði. Jákup var vorðin ússaligur og lá mest sum og dró, men jól vóru hóast tað hildin á Hellunum. Her var stákan til jóla. Jólaaftan varð dansað um jólatræið í skúlanum. Her sluppu frensar og køttar ikki upp í part, men kundu standa uttanfyri og kaga inn ígjøgnum gluggan og síggja glæmuna frá ljósinum á jólatrænum spæla sær á andlitunum á teimum glaðu børnunum. Kötturin hjá mær gloymdi ikki fylgissveinin úti í rúmdini. - Dælt er manni vitandi orð, hugsaði kötturin. Nú vóru tað ikki orð, ið komu úr rúmdini, men ljóð. Kettan skilti væl hesi ljóð og vildi ikki hava tað sitandi á sær, at hann gloymdi rúmdarhylkið úti í rúmdini, men fór niðan í bøin - undir Guldbrandshellið og dansaði sín jóladans í tí Sputnikk í klárum veðri á kvøldi fór eftir himmalhválvinum um Djúpini og Oyndarfjørð, meðan børn og vaksin sungu vakrar jólasálmar í skúlanum. Tá ið jólalesturin varð lisin, vóru jólini komin at durunum, og børn og vaksin hildu jól. Fuglfjarðar kötturin hevði jóladagar hjá skyldmanninum, Símuni, um jólini á Hellunum.

Jákup Deciderius, abbabeiggi, slóknaði 25. des. 1957. Sum sagt hevði eg fingið at vita, at jólakettan hjá mær var endað á Hellunum. Faðir og Petur Jacob, pápabeiggi, tosaðu um at fara yvir á Hellur at fylgja Jákup Deciderius til gravar. Eg vildi sleppa við.

Gott vetrarveður var henda dagin, ið jarðarferðin skuldi vera. Fleiri fuglfirðingar fóru á Skarðið til Hellurnar at fylgja. Vit fóru tíðliga frá húsum fyri at hava góða tíð og vitja skyldfólk fyri jarðarferðina. Petur Jacob og pápi fóru inn til Petur fyrst. Teir vóru systkinabørn, og høvdu abbi, Thomas Jóhan og bróðirin,



Jákup Deciderius, verið so sera væl. Petur var eitt so sera gott fólk. Hann var einkjumaður og hevði konu úr Leirvík. Hon æt Atlanta og var systir konu Símun, sum æt Helga. Petur og Atlanta untust bert fýra ár saman, so doyði hon, men fjálgt var altíð inni hjá hesum mentaða manni, eisini henda morgun, hóast sorgin nívdi, var hugnaligt undir bitunum hjá Peturi. Marin, systir Petur, helt hús við honum.

Eg kundi ikki bara mær, men mátti spyrja Petur eftir kettuni - Jú, tað veit eg at siga tær. Hon hevði tað gott. Hon var í góðum hondum. Símun hevði tikið sær av henni. Hon hevði jóladagar. Sjálvandi var eg komin at fylgja abbabeiggja til gravar, men eg mátti fáa fatur á kettuni. Faðir, Petur Jacob og Petur høvdu so nógv at práta um og fullu teir í prát um skyldskap og gamlar dagar.

Eg sníkti meg útum fyri at vita, um eg sá elskuligu kettu mína. Kavin var so reinur og feimur, og vældæmt vetrarljós kreyp húsanna millum. Fór spákandi oman ígjøgnum bygdina og hugdi undir hjallarnar á leiðini. Boygdi meg niður og kiskaði undir hvørjum hjalli, eg kom framvið. Fólk hildu meg vera løgnan, og onkur spurdi meg, hvat eg gjørd? Eg svaraði, at eg var komin at fylgja abbabeiggja til gravar. Jú, dekanfari ikki kom kettan undan einum av hjøllunum og leyp í føvningin á mær. Hetta var ein gleðilig stund, hóast sorgin nívdi. Eg fór beina leið til Símun við kettuni og segði mína søgu. Símun smíltist og mælti: - Eigur tú kettuna, skalt tú fáa hana við tær aftur til Fuglafjarðar. Lat okkum goyma hana í kjallaranum, til tit fara yvir aftur. Kettan búleikaði í kjallaranum og hevði havt tað gott. Nú skuldi útlegdin fáa ein enda.

Eftir ervið fóru pápi og eg heim til Oyndarfjarðar at vitja skyldfólkið í móðurættina. Vit fóru um brúnna við Heljareygað í Laksá, millum Duris og Klettar, tóku okkum niðan á koyrivegin, og gingu vit fet fyri fet heim til Oyndarfjarðar - heim í Ansastovu.

Kettuna høvdu vit í eini pappeskju, men ikki var hetta gamansleikur, serliga tá ið vit komu til Heljareygað, tá kom rimpilsi á hana, og vildi hon sleppa út úr hesum búri. Har var einki at gera. Hon ragjørdi niðri í eskjuni og vildi skræða alt fyri sær. Hon leyp yvir á brúnna og fór at mala og dansa sín løgna rúmdardans. Yvir Heljareygað lá tann blái ísur, og himinin var heiður. Faðir dámdi einki henda sjónleik, tí íbygt var ímillum Duris og Klettar. Myrkt var, og bláliga lýsið frá skyggjísinum í homrunum og Heljareyga fekk alt upp at darta. Eg segði við faðir. - Hygg upp í loft, pápi! Hygg, sært tú ikki Sputnikk, hvar hann fer! - Jú, sanniliga síggi eg hann! - Ja, kettan fer at valsa - ella at dansa ein dupultan reynlendara, tá ið Sputnikk fer um himmalhválvið yvir Føroyum, segði eg.

Vit stóðu har á brúnni og eygleiddu fylgissveinin, meðan jólakøtturin dansaði sín sermerkta kettudans. Hesa skammu stund stóðu vit sum lamslignir. Eitt veikt endurskin - ein veik glæma frá fylgissveininum fór um bláísin í Heljareyganum, so heljardýpið undir brúnni og í rúmdini var so djúpt, at hugflogið ikki rakk á botn í tí bláa dýpinum.

Glæman av Sputnikki hvarv undir brúnni, í tí hann fór um Hjarðardalstind. Tá hetta hendi, stóð kettan still eina løtu. Toygdi seg upp og vildi sleppa upp á tindin og gera eitt lop haðani upp á fylgissveinin. Hetta var hon ikki før fyri, hóast hennara vit var ikki av hesum heimi. Kettan kom til okkara og kíndi okkum um øklarnar. Tók hana, legði hana í eskjuna, og vit fóru víðari.

Eg helt ondini, meðan vit gingu millum Duris og Klettar. Hoyrdi at onkur stákaðist inni í klettunum. Kettan lá so músastill í eskjuni. Pápi gekk frammanfyri og eg aftaná, men her ruggaði ikki alt rætt. Knappliga kom ein allogin armur út úr hellinum og rætti seg eftir eskjuni. Eg kipti eskjuna til mín og helt fast um elskuligu kettu mína, hon skuldi ikki dragast inn til teir fornisku. Bleiv hon tað, kom hon ongantíð aftur. Bratt er eystaru megin Duris og Klettar, fór sum eitt fok sendandi oman eftir kavanum í løkin, ið rennur dygst við. Faðir stóð í skellilátri ovast uppi við eini ær við síðuna av sær. Vit eiga trý frælsi í Skarðhaga og ein av ónum, sum um summarið lá á Lakshamri, var niðri við Laksá hetta kvøldið og hevði fingið ferilin av okkum. Hon elti okkum og hamaðist uppi á mær, meðan gingið varð millum Duris og Klettar. Kaldasveittin spríkti út um meg av hesi hending, men at tað var Hvíta, ið lá á Lakshamri, sum hevði naskast uppi á mær, hevði eg ikki droymt um. Huldisligt er um hesar leiðir um kvøldið, og alt verður øðrvísi, trølsligt og hamskift. Sjálvt ein ær kann blíva til eitt huldufólk.

Eg var ikki álvuligur, tá ið vit trinu inn um gáttina í Ansastovu. Omma var uppi og Mia við. Tær vóru bæði blíðar og týðar, og fingu vit ein góðan drekkamunn. Hetta var upp undir songartíð. Dagurin hevði verið langur og fyltur við uppliving millum kross og hosu - lív, deyða og grøv. - Nú, lukka, hevur tú eina kettu við tær, so lukka. Hon kann liggja undir komfýrinum í nátt, segði omma. Mia og omma fingu søguna at vita um kettuna, og grinu tær so hjartaliga at hesum. Kettan hevði lagt seg framman fyri komfýrin. Lá og slotaði, lyfti øðrum eyganum á, hugdi yvir at okkum, og lá undir hvørjum orði. - Hvussu eitur kettan? spyr Mia. - Hon eitur einki! - Hon minnir nógv um Sputnikk. - So, ger hon tað. - Hugsi at Dunga Oluffa verður í ørviti, tá ið hon sær kettuna. Hon hevur gingið út og inn her í fleiri dagar, skrifta og formana okkum. .. Og det skal ske i de sidste dage... og jeg vil lade ske undere på himmelen.... Solen skal forvandles til mørke og månen til blod, førend Herrens store og herlige dag kommer. Sær hon hesa kettu og fær at vita hon minnir um Sputnikk, skal eg siga tær kann hon gera bart. Hon hevur meylað um Sputnikk í fleiri dagar og heldur, at jørðin gongur til grundar í morgin. Tá ið hon hoyrir ljóðini frá Sputnikki í útvarpinum, sæst bara tað hvíta í eygunum á henni. Hon verður fjar, melur um seg sjálva og gevur nøkur óskiljandi ljóð frá sær, sum ikki mannavit kemur at. Omma tín sigur bara: Alt hvad jeg må lide, lad mig ikke miste mit forstand. Dunga




*Framhald á síðu 8*